HB-ÍF 4-2 (2-2):

# Staðfesting av muninum

**Hóast tað leikliga ikki var tann stóri munurin á oddaliðnum, HB, og botnliðnum, ÍF, so sýndi dysturin sunnudagin, fleiri av orsøkunum til, at hesin munurin er á liðunum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Hóat tað gekk striltið móti ÍF, so eydnaðist HB enn einaferð at fáa fult, og nú eru bara fimm umfør eftir á málið*

Hóast fuglfirðingar undan dystinum móti HB hildu fast um, at teir høvdu góðar vónir um at fáa stig, so mundi tað vera so sum so, hvussu stórum álvara fólk mundu taka hetta í. Higartil í ár, hevur millum lítið og einki gingið eftir vild hjá uppflytarunum, og hóast útlendski styrkurin nú endaliga var upp á pláss, so ljóðaði HB á útivølli sum ein uppgáva av teimum heilt strævnu.

Kortini var heilt fitt av fuglfirðingum komið í Gundadal sunnudagin, og saman við heimaáskoðarunum, sum bara gerast fleiri og fleiri í tali, vóru hesi við til at seta dám á stemningin kring vøllin, og leingi var eisini líkt til, at gestirnir skuldu fáa nakað at fegnast um.

ÍF var nevnliga als ikki komið til Havnar fyri at leggja seg niður, ella bara at avmarka tapið. Við eini frískari 4-4-2 uppstilling, har Sylla stuðlaði væl til Magna í álopspartinum, og har miðvøllurin hevði nógvar aðrar skyldur enn bara tær verjukendu, royndu gestirnir frá fyrsta bríksli at leggja trýst á heimaliðið. Onkrar ferðir var eisini um reppið, at veruligir málmøguleikar spurdust burturúr, men eftir góðum korteri tóktist tað, at revsingin fyri framfýsnið fall.

HB hevði eisini ligið framvið nakrar ferðir, og tá Heðin á Lakjuni sendi horna úr vinstru tætt innundir málið, var Rúni Nolsøe hægstur og stýrdi bóltinum í málið.

## Álop í síðunum

Men hóast køldu skoluna, so fullu fuglfirðingarnir ikki í fátt. Teir hildu áfram við ágangandi spælinum, og serliga dugdu teir væl at gera sær dælt av veikleikunum, sum tóktust vera í borðunum á HB-liðnum.

Í høgru arbeiddi Hanus Eliasen alla tíðina hart og væl í holinum, sum ein framrættaður Heðin á Lakjuni lat eftir sær, og ferð eftir ferð megnaði hann eisini at koma framvið Janusi M. Joensen, sum tóktist hava stórar trupulleikar.

Tað tóktist heldur ikki bøta um HB-spælið, at Jákup á Borg varð kosin sum avloysarin hjá Rógva Jacobsen í álopinum. Gaman í er Jákup ein av vandamestu framherjunum í landinum, men við Halli Danielsen á høgra miðvølli var ikki sama drive í uppspælinum hjá HB, og so kundi ÍF eisini í nógv størri mun - enn teir annars høvdu kunnað - leggja trýst á ta síðuna.

## Brotsspark og ikki

Og tað var júst við uppspæli í síðunum, at ÍF fekk bæði javnað og lagt seg framum. Fyrru ferðina hevði Rúni Nolsøe annars havt púra opnan møguleika at økja um leiðsluna, men Karsten Joensen bjargaði royndini, og so fór ÍF í kontra. Hanus Eliasen varð sendur avstað í høgru, og tó at innleggið lá eins nær málinum, sum hornasparkið til 1-0 gjørdi, so var tað ein álopsspælari, sum var fyrstur á, og so stóð 1-1.

Og bara seks minuttir seinni var allur ÍF-vongurin í B36-skýlinum uppfrá. Hanus Eliasen varð enn einaferð sendur avstað í høgru, og nýggi argentinumaðurin hjá ÍF – Gunnar G. Nielsen – smekkaði til úr spískum. Skotið varð avrættað, og so lá bólturin aftur í netinum.

HB tóktist skelkað av hesum, og tað er einki at ivast í, at Gunnar átti brotsspark løtu seinni, tá Hanus legði bóltin inn um HB-verjuna. Argentinumaðurin skuldi kanska latið seg dottið, men tað valdi hann ikki at gera, og tí gjørdist talan um skotroynd uttan javnvág, og uttan at dómarin sá nakað sum helst kriminelt ganga fyri seg.

Og ístaðin gjørdist tað so HB, sum fekk brotsspark beint fyri steðgin. Tað vóru tó ikki so nógv, sum vóru sannførd um, at talan veruliga var um brotsspark, tá Heine Fernandez og Bartal Eliasen dystaðust um bóltin. Fuglfirðingarnir mótmæltu eisini av øllum alvi, men lítið hjálpti, og Vagnur var tryggur, tá hann skuldi avgreiða.

## Mistu luftina

Seinna umfarið var tað, sum hevði ÍF mist nakað av luftini. Teir royndu framvegis at halda spælinum uppi á HB-hálvuni, men nú var HB munandi betri við, og tvær útskiftingar eitt korter eftir steðgin gjørdu eisini fortreytirnar hjá ÍF verri.

Fyrst mátti Sylla skaddur fara av vøllinum, og tað gjørdi tilveruna hjá Magna munandi meira einsamalla á toppinum.

Harnæst sendi HB-bonkurin Rók F. Jespersen á vøllin fyri Vagnur M. Mortensen í eini roynd at fáa meira ferð á spælið í síðuni. Hetta noyddi ÍF at halda meira aftur í vinstra álopsborðið, og gav soleiðis HB enn betri fortreytir at halda trýstinum uppi á vøllinum.

Tað var tó í vinstra álopsborðið, at HB fann upphavið til leiðslumálið. Heðin á Lakjuni stríddi seg fram í vinstru, og tað var væl sæð av dómaranum, at hann gav Heðini fyrimun líka til hann varð feldur. Og eftirfylgjandi gav gult kort til Fritleif.

Frísparkið varð dømt á brotsteigarmarkinum, og tá Kartin so stillaði seg at verja somu síðu sum múrurin, smekkaði Jákup á Borg bara í tóma helmingin av málinum.

Hetta punkteraði av álvara ÍF. Teir royndu at flyta fólk fram í royndunum at javna, men hetta betraði um kontra-fortreytirnar hjá HB, sum við einum fyrimyndarligum kontraálopi kundi staðfesta sigurin.

## Munurin

Enn einaferð prógvaði HB kanska meira enn nakað, at teir hava júst tær dygdirnar, sum eyðkenna eitt oddalið. Kanska spælir hepnið eisini sínleiklut, og brotssparksdómurin – eisini tann vantandi – vóru so avgjørt ikki í parti við fuglfirðingunum.

Men tað man vera sjáldan – um nakrantíð - at nakað lið er vorðið meistari, uttan ein ávísan part av hepni, og so ræður jú eisini um at leita sær fram til saman hepni.

Júst tann partin av spælinum megnaðu fuglfirðingarnir ikki sunnudagin, og helst er hetta eisini ein av orsøkunum til, at liðið liggur so niðarliga.

Innsatsinum bilti tó einki við sunnudagin, og megnar liðið at halda fast í hesum, so er einki at ivast í, at stigini fara at koma á kontina, og í øllum førum verður tað meira enn trupult hjá nøkrum aðrudeildarliði at basa teimum, skuldi tað komið hartil, og ÍF skal spæla fyri tilveruni í bestu deildini.

### FAKTA UM DYSTIN

**HB-ÍF 4-2 (2-2)**
1-0: Rúni Nolsøe, 16.
1-1: Høgni Zachariasen, 33.
1-2: Gunnar G. Nielsen, 39.
2-2: Vagnur M. Mortensen (br.), 45.
3-2: Jákup á Borg, 71.
4-2: Jákup á Borg, 78.
**HB:** Bárður Johannesen – Vagnur M. Mortensen (Rókur F. Jespersen, 61.), Jan C. Dam (Rasmus Nolsøe, 82.), Símun Eliasen, Janus M. Joensen – Hallur Danielsen, Rúni Nolsøe, Kári Nielsen, Heðin á Lakjuni – Jákup á Borg, Heine Fernandez
GK: Heðin á Lakjuni, 32., Janus M. Joensen, 72.
**ÍF:** Kartin Joensen – Fritleif í Lambanum, Viggo Johannesen, Bartal Eliasen, Rúni Elttør – Hanus Eliasen, Høgni Madsen, Gunnar G. Nielsen, Høgni Zachariasen – Sylla D. Ahmed (Eyðovlur Petersen, 61.), Magni á Lakjuni
**GK:** Hanus Eliasen, 42., Høgni Madsen, 45., Viggo Johannesen, 48., Fritleif í Lambanum, 70.
**Dómari:** Dagfinn Olsen. Hóast einstøk mistøk altíð vilja koma fyri, so sýndi hann aftur, at hann avgjørt hoyrir til toppin av føroyska dómaraheiminum. Hevði uttan stórvegis dikkedarir tamarhald á dystinum. Hevði eisini nakað so óvanligt sum eitt par av hjálpardómarum, sum livdu upp til heitið, og sum enntá hava lært seg, hvussu off-side reglurnar eiga at tulkast.





*Vágbingar eru enn við í stríðnum um europeisku atgongumerkini, eftir at teir sunnudagin vunnu útidystin móti EB/Streymi*
*Mynd: Áki Bertholdsen*

VB-EB/Streymur 2-0 (1-1):

# Lýggjari á Eiðinum

**Poul N. Poulsen varð dagsins maður í Vági, tá VB aftur fekk stig á kontina**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir tvær úrslitaleysar royndir bragdaði aftur hjá VB sunnudagin. EB/-Streymur var komið á vitjan, og tó at bæði liðini vóru stødd miðskeiðis á stigatalvuni, so duldi hvørgin parturin fyri, at tey høvdu ynski um at lyfta sær nakað á.

## Gestirnir omaná

Tað var EB/Streymur, sum byrjaði dystin betri. Hugburðurin hjá gestunum var nakað væl betri enn tað, sum vertirnir sýndu, og fleiri ferðir høvdu teir eisini hug at koma heilt tætt málinum hjá VB, uttan at nakar veruligur opin møguleiki tó spurdist burturúr.

VB hinvegin tóktist frá byrjan als ikki til reiðar til uppgávuna. Vanligi stríðssinnaði hugburðurin hjá heimaliðnum, var als ikki til staðar. Teir taptu flestu nærdystirnar, og tá teir komu á odda, var hetta als ikki í tráð við spælbýtið.

Unglingaleikarin, Poul N. Poulsen, sum undan hesum als ikki hevur skorað í bestu deildini, royndi seg við langskoti. Skotið skuldi ikki givið Gunnari á Steig nakrar serligar trupulleikar, men tað varð avrættað á vegnum, og so var málverjin púrasta prísgivin.

Gestirnir hildu tó fast um sítt trýst móti VB málinum. Vanliga so væl skipaða VB-verjan sá í løtum ógvuliga tunn út, og eftir góðum hálvum tíma eydnaðist eisini gestunum at javna. Bárður Olsen tóm ímóti bóltinum stutt uttan fyri brotsteigin, og róliga mest sum legði hann bóltin framvið Bjarna í VB-málinum.

## Barnamistak

Í seinna hálvleiki var býtið av spælinum nakað javnari. Fyrst og fremst tí vágbingarnir nú høvdu ásanna, at teir helst einki fóru at fáa við sær, um avrikið var tað sama, sum fyri steðgin.

Opnu møguleikarnir lótu tó framvegis bíða eftir sær, men móti dystarenda kom av álvara lív í. Sonni L. Petersen hjá EB/Streymi hevði júst havt eitt skot á stólpan hjá Bjarna Johansen, men vágbingarnir sluppu við skrekkinum, og so høvdu teir eisini yvirskotið til leita sær sigursmálið.

Jón Pauli Olsen gjørdi skjótt av, at tá leikararnir hjá EB/Streymi royndu at mótmæla frísparksdómi. Úrslitið var, at markeringarnar í feltinum als ikki vóru komnar upp á pláss, tá bólturin kom innfyri, og so kundi Poul N. Poulsen við sínum næsta fyrstudeildarmáli gerast stóra hetjan, meðan teir hjá EB/Streymi kundu iðra seg. Teir høvdu gjørt eitt av elstu mistøkunum í spælinum, og tað vórðu teir eisini revsaðir fyri.

## Europeiskir tankar

Soleiðis sum úrslitini lagaðu seg, so fekk VB við sigrinum lyft seg tvey pláss upp á talvuni, og tað er nokk alt annað enn óhugsandi, at teir skulu koma enn nærri toppinum.

Komandi dystirnir eru móti teimum báðum niðastu liðunu, ÍF og B68, og megna vágbingar at fáa fult her, samstundis sum onkur av kappingarneytunum snávar, fer tað av álvara at síggja heilt spennandi út hjá europeiska fótbóltinum í Vági, har tað higartil eru skrivaðir tveir kapitlar.

Hjá EB/Streymi bendir alt hinvegin á, at støðan fyri tað heilt nógv skal vera tann sama, sum hon var í fjør. Tá hótti EB/Streymur fleiri ferðir við at melda seg inn í heiðursmerkjastríðið, men hvørja teir av álvara skuldu prógva sítt virði her, snávaðu teir. Spurningurin er so, hvørt teir fáa reist seg, tá GÍ kemur á vitjan komandi vikuskifti.

### FAKTA UM DYSTIN

**VB-EB/Streymur 2-1 (1-1)**
1-0: Poul N. Poulsen
1-1: Bárður Olsen
2-1: Poul N. Poulsen
**VB:** Bjarni Johansen – Jákup Olsen, Eyðun Jacobsen, Anders Sørensen, Kári í Lágabø – Palli Augustinussen, Poul N. Poulsen, Milan Kulic, Símun Samuelsen – Mindaugas, Dan Djurhuus
**EB/S:** Gunnar á Steig – Carl H. Høgnesen, Fróði Clementsen, Andrzej Pacek, Gert Hansen – Marni Djurhuus, Jákup Martin Joensen, Knút Vesturtún, Bárður Olsen – Sonni L. Petersen, Sorin Anghel

# Á rættari leið



Hóast tað móti endanum av dystinum tóktist dekan ov einsligt hjá Magna á Lakjuni á toppinum, so hevði hann stóran part av dystinum verið við til at mynda gott álopsspæl hjá ÍF.

Og hóast hann sjálvsagt iðraði seg um enn eina úrslitaleysa roynd, so dugdi hann vælat síggja tað positiva í avrikinum hjá ÍF.

– Eg haldi, at vit eru við at finna rætta lagið aftur. Vit spæla ein góðan dyst í dag, og útlendsku leikararnir vísa seg sum góður styrkur, so eg ivist ikki í, at tað fer at koma hjá okkum.

– Enn manglar so bara tað allar seinasta pettið, men tað mugu vit so arbeiða okkum fram til, helt Magni á Lakjuni, at enda.

Hvussu tað so fer at hilnast hjá ÍF, má tíðin vísa, men skal liðið vinna seg upp um strikuna, skulu skjótt nógv stig til. Eftir sigurin hjá KÍ um vikuskiftið eru nevnliga níggju stig upp til áttanda plássið.

**-jm**

# Eitt fet nærri



Longu eftir dystirnar seinasta vikuskifti vóru fleiri, sum høvdu hug at ynskja HB tillukku við triðja meistaraheitinum. Í so máta mundi dysturin sunnudagin vera ein alarmklokka, sum fekk tey at ásanna, at enn eru fimm dystir eftir at spæla, og sum so var HB-venjarin ikki ósamdur í hesum.

– Eg vil siga bæði og. Vit vistu undan dystinum, at uppgávan væl kundi gerast trupul, og eg haldi eisini, at ÍF spældu ein góðan dyst. Tað var í øllum førum trupult at síggja mun á, hvat lið var oddalið, og hvat var botnlið, helt Heine Fernandez eftir dystin.

– At enda, so megna vit tó at toga okkum avstað við einmansavrikum, soleiðis at vit fingu stigini.

Nú eru fimm dystir eftir. Eru tit at kalla meistarar nú?

– Sjálvandi ikki. Tað eru framvegis fimtan stig eftir, men vit komu so eitt fet nærri í dag. Vit hava sjálvir strítt okkum fram í verandi støðuna, har vit eru seks stig undan næsta liðnum, so nú skulu vit eisini vísa, at vit eiga at verða verandi, helt hann at enda.

**-jm**